# Leita eftir samstarvsfeløgum bæði í Føroyum og uttanlands

**Felagið Faroe Marine er nú farið at leita eftir samstarvsfeløgum, sum kunnu styrkja felagið fíggjarliga og fakliga**

BIOTØKNI
*Áki Bertholdsen*

Tað eru bæði føroyingar og útlendingar, sum eru saman um nýggja felagið, Faroe Marine Biotech, sum nú er farið undir royndirnar at vita, um tað ikki ber til at gagnnýta fiskaryggir og livur, sum greitt er frá áhinari greinini her á síðuni.

Egil Olsen, sum er stjóri í felagnum, sigur, at fíggjarliga er virksemi av biotøkniskum slagi ógvuliga krevjandi. Tí verður arbeitt við at við at finna samstarvsfelagar, sum kunnu vera áhugaverdir fyri felagið og sum kunnu vera við til at styrkja tað, bæði fíggjarliga og fakliga.

– Vit leita eftir íleggjarum, sum hava eina vitan, sum kann koma felagnum til góðar. Ymisk nøvn eru frammi, bæði á føroyskum og útlendskum fyritøkum, sum hava stóran áhuga fyri at vera við, men enn er ov tíðliga at siga nakað um tað, sigur Egil Olsen.

Umframt Egil Olsen sjálvan, eru hinir føroysku eigararnir í Faroe Marine Biotech, Adrian Dalsá fiskivinnufrøðingur í Saltangará, sum er stjóri á Kósini í Klaksvík og Dánjal á Argjaboða, apotekari, sum býr í Danmark og sum hevur fingist nógv við biotøkniskar spurningar í fleiri ár og hevur drúgvar arbeiðsroyndir bæði í Danmark, Føroyum og úti í heimi. Umframt hesar, eigur partafelagið Sesam á Tvøroyri 20% av partapeninginum í Faroe Marine Biotech.

Sesam, er eitt felag ið Egil Olsen, umframt Marner Lisberg, Magnus Jespersen og Ólavur Bjarkhamar, allir á Tvøroyri, eiga, og er eitt felag í Delta samtakinum. Felagið eigur m.a. 75% av partapengunum í línuskipinum Hoyvíkingi.



*Fleiri nøvn eru frammi, sum hava stóran áhuga í at vera við, bæði føroysk og útlendsk, sigur Egil Olsen, stjóri í Faroe Marina Biotech*

Útlendsku partaeigararnir í biotøkniska felagnum Faroe Marine Biotech, er Lýsi HF í Íslandi og Maritex A/S í Noregi.

Partapeningurin í Faroe Marine Biotech er 500.000 krónur. Tað hevur heimstað á Tvøroyri, men hevur fyribils leigað sær skrivstovuhøli í húsunum hjá Arbeiðara-felagnum Hæddini í Runavík.

Helvtin av partapeninginum er føroyskur og helvtin er útlendskur.

### Stórur fyrimunur

Egil Olsen hevur fyrr sagt við Sosialinu, at hann sær ein stóran fyrimun í at hava útlendskar samstarvsfelagar við í felagnum.

Hann sigur, at báðar útlendsku fyritøkurnar, sum eru við, eru ímillum tær fremstu í Evropa á sínum øki og tí heldur hann, at tað er ein stórur vinningur at hava fingið tær upp í ætlanina.

– Orsøkin til, at vit hava fingið hesar báðar fyritøkurnar uppí ætlanina, er, at vit mugu viðurkenna, at skulu vit byggja eina biotøkniska vinnu upp í Føroyum, er tað neyðugt hjá okkum at útvega okkum servitan á økinum, hevur Egil Olsen sagt við Sosialin Nevndin í Faroe Marine Biotech er mannað við Geir Wilhelm Wold úr Noregi, ið er formaður og umboðar Maritex, Katryn Petursdóttir, úr Íslandi, ið umboðar Lýsi, Ólavur Bjarkhamar, ið umboðar Sesam, umframt Adrian Dalsá og Dánjal á Argjaboða. Nevndin í Faroe Marine Biotech er mannað við Geir Wilhelm Wold úr Noregi, ið er formaður og umboðar Maritex, Katrín Petursdóttir, úr Íslandi, ið umboðar Lýsi, Ólavur Bjarkhamar, ið umboðar Sesam, umframt Adrian Dalsá og Dánjal á Argjaboga.

Tey, ið vilja vita meiri um útlendsku íleggjararnar í felagnum, kunnu fara á alnetið undir www.lysi.is og undir www.maritex.com

# Stórur møguleikar at fáa nakað burturúr fiskaryggjum og livur

**– Felagið Faroe Marine Biotech er farið undir kanningar við tí endamáli at fáa meiri burturúr ryggjum og livur av fiski, sum annars verða tveittar fyri borð. Ábendingar, sum vit higartil hava fingið, eru lovandi, sigur Egil Olsen**

BIOTØKNI
*Áki Bertholdsen*

–Enn ber ikki til at siga nakað um úrslitið, men tær ábendingar, vit hava fingið, eru lovandi, sigur Egil Olsen.

Felagið, Faroe Marine Biotech, sum hann er stjóri í, lá ikki longi í dvala. Felagið, sum hevur til endamáls at fara undir biotøkniska vinnu í Føroyum, varð stovnað í vár og og felagið er longu farið undir sína fyrstu granskingarætlan -og heilt skjótt verður eisini farið undir tað næstu.

Egil Olsen kann ikki siga í smálutum, hvat endamálið við verkætlanini er. Men í stórum kann hann siga, at ætlanin er at vita, hvussu ryggir á fiski kunnu gagnnýtast betri.

Hann sigur, at enn eru royndirnar komnar so stutt, at tað er ómøguligt at siga nakað um urslitið.

– Men tær fyrstu ábendingarnar, vit hava fingið eru lovandi, leggur hann afturat.

Hann sigur tann praktiski parturin av hesi verkætlanini fer at fara fram á Sandoy Seafood í Sandoynni og á Kósini í Klaksvík..

Men av tí at ongin rannsóknarstova er í landinum, sum kann gera tann partin av royndunum, sum krevur laboratoriukanningar. verða nógv tað mesta av hesum parturin av verkætlanini, gjørdur uttanlands.

Enn ber sostatt heldur ikki til at siga nakað um, nær hendan verkætlanin er liðug.

– Fyribils hugsað vit einans um tann biokemiska partin av hesi verkætlanini. Verður úrslitið av teimum, at tað letur seg gera at fáa úrdráttir burturúr ryggjunum, sum kunnu gagnýtast til ymisk endamál, fara vit eisini at gera kanningar fyri at vita um tað loysir seg fíggjarliga.

### Functional foods

Hann sigur, at endamálið er at brúka úrdráttir úr ryggingum til mannaføði av onkrum slagi, eitt nú til “functional foods”, sum tað nevnist á fakmáli.

Men akkurát hvat tað kann vera, ber ikki til at siga nakað um enn. Av tí sama ber heldur ikki til at siga nakað um, hvørjir teir møguligu marknaðirnir kunnu vera.

“Functional Foods” er at vinna ymisk evni burturúr ryggjunum, sum síðani verða settar til aðrar matvørur.

Eitt dømi kann vera, at kalcium verður vunnið burturúr ryggjunum og sett til mjólkarúdráttir, fyri at kunna lýsa við, kalciumríkari mjólk, tí tað er gott fyuri heilsuna.

Hann sigur, at vísir tað seg at bera til, kann talan skjótt verða um ein hampiligan vinnuveg, sum kann kasta nógv av sær til samfelagið, umframt at tað kann skapa arbeiði og verða eitt ískoyti hjá teimum virkjum, sum sostatt eisini fáa vinning av at selja ryggirnar, heldur enn at betala fyri at sleppa av við slógvið.

– Vit vita, at eini 12%-15% av einum fiski er ryggur. Í hesum føri eru tað ryggurin í toski, hýsu og upsa, sum er áhugaverdur.

Siga vit, at vit fiska 70.000 tons av hesum fiskasløgunum um árið, verður talan umleið 10.000 tons av ryggjum. harafturat koma so ryggirnir av øllum laksinum, vit ala og virka í Føroyum, so talan er um stórar nøgdir.



*–Fiskaryggir og livurin eru tveir partar av fiskinum, sum ikki vera brúktir sum er. Vit halda, at stórir møguleikar eru fyri, at tað ber til at gagnnýta tað, so at tað verður eitt fíggjarligt íkast, sigur Egil Olsen, stjóri á Faroe Marine Biotech*

Hann sigur, at tað er rættiliga dýrt at gera royndir av hesum slagi, men teir hava m.a fingið stuðul til ætlanina frá oljufeløgunum báðum, BP og Amerada Hess.

### Livur fyri 70-100 milliónir

Eitt mál, sum liggur ógvuliga frammaliga hjá Faroe Marine Biotech, er at vita, um tað ikki ber til at fáa nakað burturúr livrini.

– Hvørt ár tveita vit eini 10.000 tons av livur fyri borð aftur- tvs, at livurin kemur innanborða av sær sjálvum við fiskinum, men vit leggja arbeiði í at tveita hana fyri borð aftur.

– Hetta er spell, tí vit vita, at tað ber til at gagnnýta livrina, bæði til lýsi og til niðursjóðingar.

Egil Olsen sigur, at hetta er ein trupulleiki, sum felagið ætlar at taka upp, tí hann ivast ikki í, at bera vit okkum rætt at, er grundarlag fyri at fara undir eina framleiðslu av onkrum slagi við tí endamáli at gagnnýta livrina.

Hann veit, at vit hava roynt áður at gagnnýta livur, men talan hevur bara verið um at bræða hana til lýsi, sum ikki hevur verið serliga hávirkað lýsi og tað gevur ov lítið.

Tað, sum hann sær fyri sær sum ein møguleika, at gagnnýta ein part av livrini til lýsi, men at niðursjóða tað bestu livrina.

Hann ásannar tó, at skal hetta verða veruleiki, er neyðugt at tað vit fáa skip og bátar at taka livrina. Og tað merkir so eisini, at tey skulu fáa prís fyri livrina so at tað loysir seg hjá teimum at avreiða hana. Samstundis má talan verða um framleiðslu á sum kastar so frægt av sær seg hjá skipum og bátum at avreiða livrina og at eisini virkini á landi kunnu fáa lønandi vinnu burturúr.

Hann heldur, at góð útlit eru fyri at fáa nakað burturúr livrini, tí tað fáa tey bæði í Noregi og í Íslandi, so hví ikki eisini í Føroyum?

– Samstundis vita vit, at marknaður er fyri livur, bæði fyri lýsi og fyri niðursjóðaðari livur.

Og tað skilst, at eydnast tað, kann tað gerast eitt rættiligt ískast til føroyska samfelagið.

– Vit vita, at við teirri mest einfaldu framleiðsluni, kunnu vit fáa eitt søluvirði burturúr upp á 70-100 milliónir um árið burturúr livrini, sum vit annars tveita fyri borð.



# Notio ger íløgu í Kall

**Nýggja privata framtaksfelagið Notio hevur keypt 18,5 prosent av partabrøvunum í telefelagnum Kalli. Prísurin er 5,9 milliónir krónur. Stjórin metir, at Kall hevur stórar vakstrarmøguleikar, og at teir fara at vinna peningin innaftur**

ÍLØGUR
*Stefan í Skorini*

– Vit meta, at Kall er ein spennandi fyritøka við munandi vakstrarmøguleikum, og tí hava vit valt at gera okkara fyrstu íløgu í Kall, sigur Kristian Petersen, stjóri í Notio, og hann metir, at møguleikarnir fyri at vinna peningin innaftur eru góðir.

Kall hevði eitt undirskot á slakar tíggju milliónir krónur í seinasta roknskapi, men hetta metir framtaksfelagið ikki sum nakra forðing.

– Tað er als ikki óvanligt, at slík feløg hava undirskot ta fyrstu tíðina. Vit hava gjørt hesa íløguna við vinningi fyri eyga, og tí eru vit sannførdir um, at gongdin fer at venda í nærmastu framtíð, sigur stjórin.

### Vakstrarmøguleikar

Kristian Petersen nevnir í sambandi við vakstrarmøguleikarnar hjá Kalli, at telefelagið í heyst eisini fer bjóða kundum sínum GSM-fartelefoni, og á hesum økinum eru góðir møguleikar fyri stórum vøkstri í framtíðini.

Notio leggur dent á, at Kall longu hevur fingið ein fittan part av fastnettelesamskiftinum í hjá virkjum og húsarhaldum. Næsta stigið verður so GSM-telefoni.

Stjórin metir, at prísurin á 5,9 milliónir krónur fyri 18,5 prosent av partabrøvunum er rímiligur, og at hann svarar til kapitalhækkingina, sum stendur fyri framman.

Kall fer nevniliga undir nýtekning av av partapeningi um stutta tíð. Orsøkin til tað er, at tá felagið í næstum fer at bjóða GSM-hald, skal Kall gera nýggjar íløgur og hevur harvið tørv á størri kapitali.

Tann almenni Framtaksgrunnurin eigur eisini ein part av telefelagnum Kalli, men stjórin er ikki bangin fyri at gera íløgur í somu fyritøkur sum hitt framtaksfelagið á marknaðinum. Í summum førum kunnu báðir grunnarnir supplera hvønn annan, sigur hann.

Keypið av partabrøvum í Kalli er fyrsta íløgan, sum Notio hevur avgreitt, síðan felagið varð stovnað. Eigararnir av partafelagnum Notio eru Kaupthing, Sparikassagrunnurin, Tórshavnar Skipasmiðja, Framherji, Varðin og Poul Michelsen. Partapeningurin er 26 milliónir krónur.

Kristian Petersen leggur afturat, at felagið arbeiðir við fleiri spennandi íløgum, sum eru í umbúna, men hann vil tó ikki upplýsa, hvørjar hesar ætlanirnar eru, tí vandi er fyri, at stararnir flúgva av takinum, sum hann tekur til.



*Kristian Petersen, stjóri í framtaksfelagnum Notio, metir, at Kall hevur stórar vakstrarmøguleikar, og tí hevur felagið keypt 18,5 prosent av partabrøvunum í telefelagnum*

MYND: Jens Kr. Vang

# Haraldssund stongt

ILA
*Stefan í Skorini*

Av tí at ILA er staðfest í alibrúkinum hjá Faroe Salmon í Haraldssundi hevur landsstýrið sett forboð fyri óviðkomandi sigling nær við alibrúkið.

Ikki er loyvt at fiska ella sigla nærri enn 500 metrar frá aliringunum norðanfyri byrgingina í Haraldssundi. Eisini er forboð sett ímóti óviðkomandi ferðslu á støðini hjá Faroe Salmon á landi.

Forboðið er sett í gildi við heimild í djórasjúkulógini um fyribyrging og niðurberjing av sjúkum hjá djórum og um marknaeftirlit við djórum og djóraúrdráttum.

# Sundabrúgvin verður tryggari

FERÐSLA
*Stefan í Skorini*

Landsverkfrøðingurin boðar í dag frá, at framyvir verður ikki loyvi at fara framum annað akfar á Sundabrúnni.

Hetta verður gjørt fyri at bøta um trygdina á brúnni. Í hesum mánaðinum verða skelti sett upp, ið seta forboð fyri at fara framum annað akfar á brúnni. Eisini verður ein hindrunarstrika málað av vegin, ið greitt boðar frá hesum forboði.

Hetta boðar Landsverkfrøðingurin frá í tíðindaskrivi.

# Fríkendur fyri hassjsølu

**Ein 29 ára gamal maður varð mikudagin fríkendur fyri at hava keypt 10 kilo av hassji í stóra narkomálinum. Hann varð hinvegin funnin sekur í sjey øðrum ákærum um harðskap, stuldur og keyp av 90 grammum av hassji, og hann fekk 4 mánaða fongsulsrevsing**

RÆTTARMÁL
*Stefan í Skorini*

Føroya Rættur fann ikki haldgóð prógv fyri, at ein 29 ára gamal maður skal hava keypt 10 kilo av hassji frá høvuðsákærda í stóra narkomálinum. Maðurin hevði annars játtað hesa nøgdina fyri løgregluni, men hann nú tá hann sjálvur var ákærdur, noktaði hann seg sekan.

36 ára gamli danin, sum var høvuðsákærdur í narkomálinum, var eisini fríkendur í síðstu viku fyri at hava selt manninum hesa nøgdina.

Ákæruvaldið hevði ikki tey neyðugu prógvini at fáa mannin dømdan. Tað vildi annars vera við, at sølan er farin fram síðan 1988. Tað einasta ákærin kundi vísa á, var avhoyringin hjá politinum, men hetta var ikki nóg mikið. Vanligt er, at ein játtan eisini skal verða undirbygd við prógvum.

Dómarin nevndi í dóminum, at løgreglan ikki hevur funnið nøkur prógv fyri hesum, hóast hon hevur framt umfatandi kanningar í hesum málinum. Eisini er tað umráðandi, at hesir báðir menninir hava verið avskornir frá hvørjum øðrum í fleiri ár.

### Dømdur fyrr

29 ára gamli maðurin varð tó funnin sekur í sjey øðrum ákærum um innbrot, stuldur, harðskap og keyp av 90 grammum av hassji.

Hann varð funnin sekur í fimm málum um innbrot og stuldur, sum hann játtaði seg sekan í. Harafturat játtaði hann seg sekan í at hava keypt 90 gramm av hassji frá høvuðsákærda í narkomálinum.

Hann noktaði seg hinvegin sekan í at hava gjørt seg inn á fyrrverandi unnustu sína. Hon vitnaði tó í rættinum, at hann hevði framt harðskap móti henni, hóast hon ikki fekk skaða av hesum, og maðurin varð eisini funnin sekur í hesum.

Dómarin gjørdi av, av maðurin skal inn at sita í fýra mánaðir, og hann skal rinda eina bót á 2.200 krónur. Harafturat skal hann rinda sakarmálskostnaðin. Maðurin tók við dóminum beinanvegin.

Tað hevði herðandi ávirkan á longdina á fongsulsrevsingini, at maðurin fleiri ferðir áður er dømdur fyri líknandi lógarbrot.


GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

| | |
|---|---|
| **Nissan Micra 1,0 GX** gráur, 5 hurðar, árg. 1999, 27.000 km. | 85.000 |
| **Nissan Micra 1,0** grønur, 3 hurðar, árg. 2000, 27.000 km. | 88.000 |
| **Nissan Almera 2,0 Diesel GX** grønur, 5 hurðar, árg. 1997, 110.000 km. | 110.000 |
| **Nissan Almera 1,6** gráur, 4 hurðar, árg. 1996, 66.000 km. | 75.000 |
| **Nissan Almera 2,0 Diesel GX** reyður, 4 hurðar, árg. 1998, 119.000 km. | 110.000 |
| **Nissan Sunny 1,6 LX** bláur, 4 hurðar, árg. 1987. | 15.000 |
| **Nissan Primera 1,6 Player** reyður, 4 hurðar, árg. 1995, 110.000 km. | 65.000 |
| **Nissan Primera 2,0 SLX** hvítur, 4 hurðar, árg. 1997, 45.000 km. | 105.000 |
| **Peugeot 306 DT 1,9** bláur, 4 hurðar, árg. 1997, 150.000 km. | 90.000 |
| **Peugeot 605 SRDT 2,1 Aut.** bláur, 4 hurðar, árg. 1994, 230.000 km. | 120.000 |
| **Opel Corsa 1,2** grønur, 3 hurðar, árg. 1996, 40.000 km. | 65.000 |
| **Opel Astra 1,6** bláur, 5 hurðar, árg. 1995, 109.000 km. | 67.000 |
| **Opel Vectra 1,4** hvítur, 4 hurðar, árg. 1990, 255.000 km. | 26.000 |
| **Opel Vectra 2,0 Di** bláur, 4 hurðar, árg. 1998, 96.000 km. | 130.000 |
| **Subaru 1600** hvítur, 4 hurðar, árg. 1989, 140.000 km. | 10.000 |
| **Saab 900 2,0i** bláur, 5 hurðar, árg. 1996, 129.000 km. | 110.000 |
| **Fiat Tipo** grønur, 5 hurðar, árg. 1990, 196.000 km. | 10.000 |
| **Honda Civic 1,4is** grønur, 3 hurðar, árg. 1998, 101.000 km. | 99.000 |
| **Subaru Legacy 1,8 GL** beige, 4 hurðar, árg. 1991, 120.000 km. | 30.000 |
| **Volvo S40 1,8** reyður, 4 hurðar, árg. 2002, 12.000 km. | 250.000 |

Sosialurin

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61